

## Norland seldur til Libanon

**SKIPASØLA** Farmaskipið M/S Norland hjá Faroe Ship er selt til Libanon - men skipið verður kortini skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini. ,Tað er Faroe Ship, sum átti Norland, sum P/F Norlink í Norðragøtu keypti til Føroya fyri nøkurm árum síðani. Skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum, sum hevur staðið fyri sølui sigur, at Norland hevur ligið til sølu á Hulki síðani mars 2009. Keyparin er úr Libanon, og ætlanin er at sigla skipið niður til Libanon í næstum, har tað skal umbyggjast til at sigla við livandi neytum millum evropa og miðeystur. Skipið er 86 metrar langt, hevur trý dekk og ein góðan stabilitet og verður tí mett væl egnað til hetta endamál.



# Brandfellur í almennum bygningum

**BRANDFELLUR** Nógvir almennir bygningar eru í so vánaligum standi, at teir eru rætt og slætt heilsuskaðiligir at vera í. Harafturat kunnu nógvir bygningar eisini verða reinar brandfellur, tí teir eru ikki brunatryggjaðir eftir forskriftunum

Áki Bertholdsen

- Almennir stovnar og bygningar verða so illa røktir, at teir kunnu verða brandfellur og kunnu eisini í aðrar máta verða heilsuskaðiligir hjá fólki at vera í.

Tað staðfestur Ewald Kjølbro, deildarleiðari á bygningsdeildini hjá Landsverki.

Hann sigur, at tað almenna hevur forsømt sínar ognir so illa nú í nógv ár, at nú er orsøk til at rópa varskó.

- Tað, sum landið brúkar upp á at røkja og halda sínar ognir, er bara ein brotpartur av tí, sum krevst fyri at tær ikki skulu forfella.

Hann sigur, at avleiðingin av hesum forsømilsinum, er, at nógvir almennir bygningar eru rættiliga forfalnir.

- Nógvir bygningar eru í rættiliga vánaligum standi. Støðan er nú so ring, at tað er orsøk til at ávara ímóti gongdini.

- Vanligu trupulleikarnir eru lekar og fuktskaðar og tað rot, sum tað elvir til.

Leiðarin á bygningsdeildini sigur, at ein stór orsøk til teir trupulleikar, ið almennir bygningar hava av blámusoppi, sum er heilsuskaðiligur, er rætt og slætt, at teir eru ikki røktir nóg væl.

- Har er talan um lekar, har fuktur sleppur inn. Og verður tað ikki umvælt, fær tað loyvi at breiða seg og elvir til soppavøkstur.

### Almennar brandfellur

Ewald Kjølbro leggur afturat, at hendir onki munagott nú, kann væntast, at hesir trupulleikar fara at veksa.

- Sostatt stúri eg fyri, at verður onki munagott gjørt nú fara tað um nøkur ár ár verða enn fleiri almennir bygningar, sum eru heilsuskaðiligir at vera í.

Eitt annað er so tað, at nógvir bygningar kunnu verða brandfellur, tí teir eru ikki brunatryggjaðir eftir forskriftunum.

Ikki minst ger hetta seg galdandi, tá ið bygningar verða bygdir um, ella tá ið teir koma at hýsa øðrum virksemi, enn tað, teir áður hava hýst.

Dømi um hetta kunnu vera hús, sum eru keypt til eldrabýli, ella bústovnar av ymsum slagi.

Tað vísir seg, at tá ið Brunaumsjónina kannar almennar bygningar, eru sum oftast rættiliga nógvar viðmerkingar til brunatrygdina, men tað er ikki altíð, at ráðini eru til at fylgja forskriftunum.

- Tað er ein stórur trupulleiki, at tá ið vit sýna bygningar, síggja